# Vit skulu geva meir í menningarhjálp

**Løgmaður, Jóannes Eidesgaard heldur, at Føroyar skulu seta sær sum mál at játta 7 mio. krónur árliga til menningarhjálp. Hetta er væl meir enn undanfarin ár, har játtanin á fíggjarlógini hevur verið góðar 300.000 krónur**

MENNINGARHJÁLP
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, legði seinnapartin týsdagin fram frágreiðing til orðaskiftis um altjóða menningarpolitikk Føroya. Løgmaður skjýtur upp, at játtanin til menningarhjálp eigur at verða økt munandi, og at málið eigur at verða at játta 7 mio. krónur árliga á fíggjarlógini

### Væl minni

Seinastu árini hevur játtanin á fíggjarlógini verið góðar 300.000 krónur, og tað er væl minni enn ásetta upphæddin hjá limalondunum í Sameindum Tjóðum. ST er ein felagsskapur fyri sjálvstøðug lond og tískil fevnir ST-samtyktin ikki fyri Føroyar.

Høvdu Føroyar verið eitt sjálvstøðug tjóð, sum var bundin av samtyktini hjá ST, hevði føroyska menningarhjálpin verið umleið 72 mio. krónur í ár. Løgmaður segði undir framløguni í gjár, at Føroyar kundu sett sær sum mál at játta 10% av málinum hjá ST, sum hevði svarað til góðar 7 mio. krónur.

### Koma okkum til góðar

Jóannes Eidesgaard legði dent á, at menningarhjálp ikki er ein spurningur um pening ella peningaupphæddir. Hann greiddi frá, at meinningarhjálp eigur at hava til endamáls at menna tað samfelagið, ið verður hjálpt.

Løgmaður helt fyri, at Føroyar kunnu hjálpa best, og fáa mest fyri peningin, um føroysk servitan verður brúkt í menningini av øðrum londum.

– Føroyar eru eitt lítið oyggjasamfelag, og tí kundu Føroyar lagt seg eftir at veitt hjálp til smá oyggjasamfeløg og/ella smá lond ella eyðkend samfeløg í einum landi, segði Jóannes Eidesgaard í tinginum týsdagin.

Hann vísti á, at í hugtakinum menningarhjálp, verður hugtakið afturkast eisini nýtt. Løgmaður sipaði til, at lond, ið veita menningarhjálp hava eisini í huga ein afturkastingarpolitikk.

– Verkætlanirnar í menningarlondunum koma sostatt eisini gevaralondunum til góðar við øktum samskifti heruppi samhandli, segði løgmaður millum annað.

Aðalorðaskiftið um Altjóða menningarpolitikk Føroya verður týsdagin 27.apríl.



*Mynd: Jenis av Rana er vónbrotin av frágreiðingini hjá løgmanni um menningarhjálp. Hann heldur hon ber brá av undanførslu og kraddaralyndi*

*Mynd: savnsmynd*

# Frágreiðingin er merkt av kraddaralyndi

**Formaður Miðflokksins, Jenis av Rana, heldur lítið um frágreiðingina hjá løgmanni um altjóða menningarpolitikk Føroya. Hann sigur, at frágreiðing ber brá av kraddaralyndi og undanførslu**

MENNINGARHJÁLP
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Menningarhjálpin er skammilig. Hesa orðing hevur Miðflokkurin fleiri ferðir seinasta árið nýtt um játtanina á fíggjarlógini til menningarhjálp.

Formaður floksins, Jenis av Rana, lurtaði tí við spenningi í tinginum týsdagin eftir frágreiðingini hjá løgmanni um altjóða menningarpolitikk Føroya í framtíðini- og formaður Miðfloksins gjørdist ikki sørt vónbrotin

Jenis av Rana heldur, at frágreiðingin er bæði merkt av undanførslu og kraddaralyndi.

### Vit skulu geva

Jenis av Rana heldur lítið um orðingina hjá løgmanni um, at Føroyar skulu fáa nakað burturúr við at veita kreppuraktum samfeløgum menningarhjálp. Løgmaður nevndi í tinginum, at lond, ið geva menningarhjálp dag, eisini hava áhugað í einum afturkasti av menningarhjálpini.

– Vit skulu ikki geva nakað fyri at fáa nakað afturfyri, men tí vit ynskja at hjálpa teimum. Í halgubók stendur, at hann elskaði ein gleðan gevara og tí eiga vit at fylgja. Vit skulu ikki kalt og kyniskt rokna okkum fram til, hvat vit kunnu fáa burturúr at veita londum menningarhjálp, sigur Jenis av Rana.

Hann vísir á, at føroyingar liva í einum góðum vælferðarsamfelagi og tað er tí okkara uppgáva at geva av okkara vælferð til onnur illa stødd lond.

### Undanførsla

Í frágreiðingini um menningarhjálp, rør løgmaður framm undir, at Føroyar ikki eru partur av ST og tískil skulu vit ikki seta somu krøv til føroysku menningarhjálpina, sum ST ásetur sínum limalondum.

– Tað er totalt líkamikið ,um vit eru sjálvstøðug ella ei, tá tað kemur til menningarhjálp. Vit svimja í pengum og tí er tað okkara uppgáva at veita hjálp til tey illa støddu. Tað er undanførsla at føra fram, at vit hoyra undir Danmark og at vit tí skulu rinda minni í menningarhjálp, sigur Jenis av Rana.

Formaður Miðfloksins heldur málið eigur at verða at røkka støðinum, sum ST ásetur sínum limalondunum. Limalondini hjá ST skulu árliga rinda 0.008 % av bruttotjóðarúrtøkuni til menningarhjálp. Høvdu føroyingar havt limaskap í ST, skuldi føroyska játtanin á fíggjarlógini til menningarhjálp verið góðar 72 mio. krónur í ár

– Vit eiga at byrja at játta hasar 7. mio krónar og síðan hækka játtanina árliga. Vit røkka ikki málinum hjá ST frá degi til dags, men við hollari ráðlegging kunnu vit arbeiða eftir málinum hjá ST, sigur Jenis av Rana at enda.

# Ull sum menningarhjálp

**Tjóðveldisflokkurin skjýtir upp, at føroyska menningarhjálpin verður samantvunnin við útjaðarapolitikki. Ætlanin er at fáa újaðaran at framleiða føroyskar ullvørur til menningarlond**

MENNINGARHJÁLP
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Ull skal ikki longur bert verða Føroya gull. Stendur tað til Tjóðveldisflokkin skal føroysk ull gerast týdningarmikil partur av føroysku menningarhjálpini í framtíðini.

Hergeir Nielsen er framsøgumaður tjóðveldisflokksins í menningarmálum og hann greiðir frá, at Tjóðveldisflokkurin ynskir at samantvinna útjaðarapolitikkin í Føroyum við meninngarhjálp.

– Vit skjóta upp, at føroyski útjaðarin skal lønast við at framleiða føroyskar ullvørur, undirklæði, troyggjur og børuteppi. Vit vita, at tað er stórur tørvur á ullintum at fjálga um hjá fólki, ið eru illa rakt í vanlukkuøkjum, greiðir Hergeir Nielsen frá.

### Reyði Krossur stuðlar

Hergeir Nielsen vísir á, at í øðrum londum verður vinnulívið tikið við í menningarhjálpina og hetta eiga føroyingar eisini at umhugsa. Framsøgumaður Tjóðveldisfloksins sigur, átakið hjá Tjóðveldisflokkinum er ein frálíkur møguleiki hjá útjaðaranum at fáa nakað av vinnuvirksemi.

– Føroysk ullvøra fær við hesum møguleika at koma út í heimin og kann gerast kend og umbiðin aðrastaðni, sigur Hergeir Nielsen

Tjóðveldisflokkurin hevur longu verið í samband við Reyða Kross í Føroyum og Reyði Krossur heldur ,at hugskotið um at føroyskar ullvørur sum menningarhjálp er frálíkt.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Til minnis um mammu mína

## Judith Nolsøe, Dalur

Tað vóru tungir dagar, tá mamma varð tikin frá okkum, bert 63 ára gomul. Eitt ljós var slóknað, ein eingil var fluttur heim til Harran. Tað er ongin og onki, sum kann erstatta mammu.

Mamma var bert 17 ára gomul, tá hon fekk tað fyrsta barnið, og tá hon var 25 ár, átti hon fimm børn, Maritu, emil og so okkum trý, Gunnar, Julian og meg, sum eru tríburðar, og tá hon var 32 fekk hon lítlusystur Katrin, so tað hevur mangan verið ógvuliga strævið. Pápi var altíð á sjónum, so hon mátti klára alt heima, men ongantíð hoyrdi eg hana gremja seg. Tað, sum mamma livdi fyri, var pápa og okkum børn, og síðan ommubørnini.

Tað, sum sermerkti mammu var, at hon ofraði seg fyri okkum øll, tonkti aldri upp á seg sjálva, men livdi fyri at hjálpa øðrum.

Saknurin er stórur hjá tær, góði pápi, og eisini hjá tykkum í Dali, sum øll vóru hennara vinir. Tað vóru altíð nógv fólk, sum komu á gátt heima hjá okkum í Dali, mamma hevði altíð stundir at seta seg niður at práta, var altíð klár við einum drekkamunni.

Saknurin er ómetaliga stórur, men tað er gott at vita, at ein dag so síggjast vit aftur heima hjá Jesusi, har ongin skilnaður verður meira.

*Tvær ídnar hendur hava lagt árarnar inn í dag,*
*eitt hjarta av gulli hevur sligið sítt síðsta slag,*
*tað ljósið vil altíð í okkara hjørtum vera,*
*saknin av tær vit mugu bera.*

Ærað veri minni um mammu mína.

**Hedvig**

## Vinnie Splidt deyð



Hósnáttina 15. apríl andaðist Vinnie Splidt í Ålborg, 62 ára gomul.

Vinnie var ættað úr Vági, dóttir Helgu, sum var av Fanø, og Jóhan Godtfred, Jóhan hjá Diasi á Heyggi. Jarðarmóðirin í syðru helvt av Suðuroynni hevði úr at gera tann 24. august 1941, tí sama dag vórðu fimm børn fødd har suðuri. Trý teirri vóru fødd í Vági: Vinnie, systkinabarn hennara Andrew Godtfred yngri, sum doyði fyri nøkrum árum síðani, og Ruth Smith, sum er gift við Ívari Iversen. Haraftrat varð eitt barn føtt í Porkeri og eitt í Sumba. Jarðarmóðirin hevði so vítt um at fara, at hon kom ongantíð til Helgu, men læknin var til staðar, tá Vinnie varð fødd.

Helga og Jóhan fingu fýra børn: Jonnu, Litu, Vinnie og Dias, sum øll hava búð í Ålborg tey seinastu árini.

Vinnie tók realprógv í Vági. Nakað aftaná fór hon til Hull, har hon var au pair genta í eitt ár. Heimafturkomin fór hon at arbeiða á Telegrafstøðini í Havn og arbeiddi har í nøkur ár, til hon giftist við Hjørleif Splidt av Nesi, Vági, í 1963.

Tey búsettust í Vági, har Hjørleif var deildarleiðari í Føroya Banka. Í 1991 fór hann úr hesum starvi, og tey fluttu til Ålborg, har tey hava búð síðani. Hesi árini í Ålborg hava Vinnie og Hjørleif í tíðarskeiðum havt eitthvørt fyrifallandi arbeiði.

Tey fingu tvey børn, Helgu og Andrass, sum bæði búgva í Keypmannahavn. Helga er útbúgvin korrespondentur. Andrass er løgfrøðingur. Hann er giftur við Hjørdis úr Havn.


## Móttøka

Í sambandi við stjóraskifti í P/F Fjarhitafelagnum, verður almenn móttøka á Hotel Hafnia, Parnassinum fríggjadagin 23. apríl 2004 frá kl. 15 til kl. 18.

Høvi verður at hitta nýggja stjóran Hans Christian Dam, sum tók við starvinum 1. mars 2004, og undanfarna stjóran Jóannes Hansen, ið hevur røkt hetta starv, síðani Fjarhitafelagið varð stovnað.

**P/F Fjarhitafelagið**


### Dagurin

**22. apríl. Cajus**, deyður ár 296. Hann var Pávi.

*Fríðrikur Petersen varð føddur hendan dagin í 1853.*




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin


# Løgmaður heldur flaggdagsrøðu í Vági

**Flaggdagshaldið í Vági verður sum vant við minnisvarðan flaggdagin og aftur í ár er røðarin suðuroyingur, men er tó landskendur og ikki ein og hvør**

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Skótaliðið Royndin í Vági skipar aftur í ár fyri flaggdagshaldi við Minnisvarðan. Í ár verður tað løgmaður, Jóannes Eidesgaard, ið heldur røðuna. Haldið verður flaggdagin klokkan 15:00.

Royndin hevur í mong ár skipað fyri flaggdagshaldinum í Vági og sum vanligt er, so verður eisini Kirkjukórið Ljómur við og setur dám á løtuna.

Skótaliðið hevur navn eftir Royndini Fríðu, sum Nólsoyar Páll bygdi á Fløtuni Fríðu í Vági. 200 ár eru síðani hesa hending og tí verður gjørt burturúr. Eftir flaggdagshaldið bjóða skótarnir kaffi og køkur í Skótahúsinum.


## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran ...**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri bróðir okkara

**Jóannes Olsen**
Hósvík

andaðist og varð jarðaður.

*Familjunnar vegna*

**Systkini**